# UMHVØRVISVIKAN

**á Tvøroyri 12.-18. apríl 2021**

## Mánadagin 12. apríl

### Bokashi og plantupakkar

**17:00 -19:00** Tey, ið hava umbiðið Bokashi-sett ella plantupakka, kunnu avheinta hesi millum kl. 17-19 á P-økinum sunnanfyri Ítróttarhøllina í Trongisvági.

## Týsdagin 13. apríl

### Leiguvelturnar tiknar í brúk

**17:00 -19:00** Tey, ið hava leigað veltu frá kommununi, hittast á økinum undir Heygnum og fáa ávíst økið, ið tey kunnu velta á.

**Jónleyg Bech**, forkvinna í trivnaðar- og umhvørvisnevnd Tvøroyrar býráðs, sigur nøkur orð.

## Ónsdagin 14. apríl

### Plantingardagur við Stórá

**09:30** Øll, ið hava hug til at hjálpa til, verða biðin um at møta kl. 9:30 í Ítróttardeplinum við Stórá, har ein kaffimunnur er at fáa. Til ber tó eisini at møta seinni. Takið endiliga børnini við.

**12:30** Tvøroyrar Kommuna bjóðar ein lættan døgurðabita til luttakararnir, frá **Kantinuni**, v. Anitu.



## Tórsdagin 15. apríl

### Endurnýtsla, Bokashi og list á Seglloftinum

**19:00** **Jónleyg Bech**, forkvinna í trivnaðar- og umhvørvisnevnd Tvøroyrar býráðs, bjóðar vælkomin.

**Súsanna Berg**, umhvørvisleiðari hjá IRF, greiðir frá virk seminum hjá IRF. Millum annað Bokashi-hugtakið, ið IRF stuðlar kommununum við.

**Hedvig Johansdóttir**, stjóri í Dugna, greiðir frá virkseminum hjá felagnum og **Allan Mørkøre**, deildarleiðari, fer at siga nøkur orð um virksemið á Hjalla.**Stig Elttør**, skúlaleiðari á Skúlanum við Áir, fortelur um tilboðini, ið eru á skúlanum.

**Vígdis Sigmundsdóttir** sýnir fram forvitnisligu MixMedia listarverk síni, ið eru gjørd úr endurnýtslutilfari. Vígdis er við á tiltakinum og sýnir fram, hvussu hon arbeiðir við tilfarinum

**Lív og Tróndur** spæla nøkur løg og kaffi og okkurt afturvið, verður at fáa.



# UMHVØRVISVIKAN

**á Tvøroyri 12.-18. apríl 2021**

## Fríggjadagin 16. apríl

10:00 **Umhvørvisdagur í Mýrifípuni**
Hugnaløta fyri børnunum, ið hava havt umhvørvisverkætlan hesa vikuna. Grillað verður í garðinum og sungið verður.

15:00 **Foreldrakaffi** á stovninum. Til ber at vitja forvitnisligu **umhvørvisframsýningina**, ið børnini hava gjørt. Foreldrini taka sjálvi krúss við - plast er bannað!

14:00 **Fiskaplássið verður ruddað**
**Býráðslimir og umsiting** rudda fiskaplássið hjá Thomsen. Burturkastið verður skilt og koyrt burtur.

15:00 **Framsýning í Trongisvágs Skúla**
Umhvørvisframsýning, ið børnini í Trongisvágs skúla hava arbeitt við alla vikuna.

17:00 **Áargøta 25 ár**
Gongutúrur eftir Áargøtu, við **Turið V. í Dali** sum frásøgufólki.

Endað verður í "Plantasjuni" har **Jónleyg Bech**, forkvinna í trivnaðar- og umhvørvisnevnd Tvøroyrar býráðs, bjóðar vælkomin.

**Jonny Dimon**, ið var við í fyrireikingunum, fyri 25 árum síðan, sigur nøkur orð.

Kommunan bjóðar kaffi og heimabakað afturvið, frá **Brekkucatering**.

18:00 **Kvøldseta í Naddoddaneystinum**
Hugni fyri feløgunum, ið hava tikið lut í uppruddingini í kommununi. Grillað verður og **Jákup Veyhe** undirheldur við søgum "úr Mórugøtu".

TVØROYRAR KOMMUNA

## Leygardagin 17. apríl

10:00 **Morgunmatur og almennur ruddingardagur**
Morgunmatur á Seglloftinum. Posar og einnýtisshandskar verða eisini at fáa og til ber hjá fólki at seta posar við ruski fram við vegnum. Ringjast kann síðan á tlf. **275726** so posarnir kunnu verða avheintaðir.

10:30 **Ruddingartúrur til Trongisvágsbotn**
Bussur koyrir frá Seglloftinum og til vegin niðan til Rangabotn. Harfrá verður farið til Trongisvágsbotn. **MP-Bussar** avheintar fólk aftur kl. 16:00. **Otto Gram** er ferðaleiðari og øll eru vælkomin við. Luttakararnir fáa matpakka við frá **Glasstovuni**.

12:00 -18:00 **Vármarknaður í tjaldinum í miðbýnum**
Tjaldið í miðbýnum er á tremur við spennandi vørum og til ber eisini at seta seg niður og fáa sær ein kaffimunn.

14:00 **Gongu- og ruddingartúrur í miðbýnum**
Vit hittast við **Tvøroyrar Bygda- og Sósavn**. Øll fáa handskar og posa at savna rusk í og **Chris Jan Michelsen** fer at greiða frá, um støðini vit vitja. Endað verður hugnaligu **Snaruni** til eitt prát og leskiliga suppu frá **Hotel Tvøroyri**.

17:00 **Fyrilestur og tónleikur á Seglloftinum**
**Jónleyg Bech**, forkvinna í trivnaðar- og umhvørvisnevnd Tvøroyrar býráðs, bjóðar vælkomin.

**Kári Mortensen**, deildarleiðari og **Bjartur Thomsen** á **Orka** á Umhvørvisstovuni. Teir tosa um sjóhitaverkætlanina í Leirvík, um møguleikar at gera fjarhitaskipan á Tvøroyri og um pumpuskipan millum Ryskivatn og Miðvatn, sum skal gagnnýta nýggju vindorkuna í Suðuroy betri.

**SEV** luttekur við **Terja Nielsen**, deildarstjóra fyri netið og **Hera Mortensen**, deildarstjóra fyri framleiðsluna, ið koma at greiða frá um sólorkuverkætlanina í Sumba og vindmyllulundina í Porkerishaganum.

**Hamradun** Acoustic Duo spælir nøkur løg.